# Estlendski fíggjarmálaráðharrin til Føroyar



Hin 19. mai luttekur estlendski fíggjarmálaráðharrin, Jurgin Ligi, í almennari Vinnuráðstevnu í Runavík.

Tað er Eysturoyar Vinnulívsfelag, sum hevur bjóðað Jurgin Ligi, ið varð kosin til ársins fíggjarmálaráðharra í Evropasamveldinum í 2010, til Føroyar. Ráðstevnan fer at viðgera, hvør lykilin er til estlendsku framgongdina bæði frá einum politiskum og einum vinnuligum sjónarmiði, umframt hvat Estland ger fyri at vera eitt áhugavert land fyri íleggjarar. Estland er eisini vorðið eyðkent fyri sína fyrimyndarligu skattaskipan, ið fleiri lond hava tikið til sín.



# Internet í Bussleiðini 1. juli

**HOTSPOT** Tá nýggju býbussarnir í Havn fara at koyra seinni í summar, kunnu ferðandi nýta internetið, meðan tey koyra í bussunum. Eisini ber til við fartelefonum at fylgja við, hvar bussarnir eru

Eirikur Lindenskov

Tekniska nevnd hjá Tórshavnar kommun hevur endaliga tikið av einum tilboð frá føroyskum veitara um GPS-útgerð, SMS-útgerð og hospots - ella tráðleysum interneti - til nýggju bussleiðina, sum fer at koyra fra 1. juli.

Tað sigur Levi Mørk, býráðslimur í Havn, sum hevur verið íðin talsmaður fyri at fáa slíka skipan í lag. Hann sigur, at tilboðið er í fimm stigum og fevnum í høvuðsheitum um SMS, GPS og hotspotsskipan.

- Útgerðin verður sett í nýggju bussleidina fra 1. juli. Hetta ber í sær, at allir teir 15 nýggju bussarnir hja Gundurs bussum fáa hesa skipan, sum verður sett í verk millum 1. juli og 1. otktober í ár, sigur hann.

Somuleiðis er ein onnur tænasta keypt frá øðrum føroyskun veitara. Henda tænasta fevnir um eina skipan við einum forriti til fartlelefonir, sonevnt »City App«, har tað ber til at fylgja Bussleiðini gjøgnum i-Phone og Android fartelefonir.

Á figgjarlógini fyri 2011 er ein millión sett av til endamálið.

- Eg eri sera fegin um, at hetta málið nú er komið so langt, at tað er endaliga avgreitt, sigur Levi Mørk, sum leggur afturat, at tekniska nevnd samtykti einmælt ætlanina.

# Mannarættindi í Føroyum skulu nú eftirmetast av ST

**MANNARÆTTINDI** Í dag skulu Danmark, Grønland og Føroyar fyri fyrstu ferð fyri ST Mannarættindaráðið í sambandi við eftirmetingartilgongdina, ið kallast Universal Periodic Review (UPR)

Eirikur Lindenskov

Endamálið við UPR er at tryggja, at londini veita sínum borgarum ásettu mannarættindi bæði í lóg og í verki. Hetta er ein nýggj tilgongd, har øll ST limalond skulu fyri Mannarættindaráðið at eftirmeta støðuna viðvíkjandi mannarættindum í egnum landi sum heild.

Eftirmetingin verður í dag frá klokkan 15-18 á ST mannarættinda skrivstovuni í Geneve, har ein donsk sendinevnd við umboðum úr Føroyum og Grønlandi luttekur. Danmark byrjar við eini innleiðandi framløgu á 15 minuttir, og síðan hava Grønland og Føroyar hvør sína innleiðandi framløgu á fimm minuttir hvør. Eftir framløgurnar verður eitt skipað kjak millum danska ríkið og hini ST limalondini. Eitthvørt ST limaland kann seta fram spurningar um mannarættindi í Danmark, Grønlandi og Føroyum, gera viðmerkingar og koma við tilmælum til at betra um støðuna viðvíkjandi mannarættindum.

Útgangsstøði fyri eftirmetingina er ein frágreiðing, sum danska stjórnin hevur ritað saman við Føroyum og Grønlandi, og sum var latin ST í mars í ár. Frágreiðingin lýsir støðuna viðvíkjandi mannarættindum í danska ríkinum, og Føroyar hava sín egna sjálvstøðuga part í frágreiðingini.

Uttanríkisráðið skipaði fyri almennari hoyring um mannarættindi í Miðlahúsinum tann 17. november 2010, har borgarar og áhugabólkar kundu sleppa til orðanna og á henda hátt geva sítt ískoyti til UPR tilgongdina og til frágreiðingina til ST Mannarættindaráðið. Tað, sum fundarfólk førdu fram undir hoyringini, hevur verið nýtt sum íkast til at rita føroyska partin av frágreiðingini.

Eftirmetingin verður varpað út beinleiðis á heimasíðuni hjá ST og kann síggjast á:
*http://www.un.org/webcast/unhrc/index.asp*

**Frágreiðingin sæst her.**
*Kunning um UPR tilgongdina first á heimasíðuni hjá ST á: http://www.ohchr.org/en/hrbodies/upr/pages/uprmain.aspx*


# Lekjandi tónar



Spennandi workshop, fyrilestur og konsert við Lars Muhl og Githa Ben-David verður í Grønlendingahúsinum leygardagin 14. mai kl. 10-21.

Lesið meir á:
http://lekton.cloudaccess.net

Kostnaður kr. 900,- fyri alt tiltakið íroknað heilsugóðan mat.

Tilmelding: send teldupost til
ann.askham@gmail.com